

## Lassin sæst live

Lassin Isaksen fellur nú fyri aldursmarkinum sum FIFA-dómari, og tí verður dysturin í Dublin millum Írland og San Marino tann seinasti, sum hann fer at døma á altjoða pallinum. Ein dystur, sum eisini má metast sum eitt heraklapp, nú føroyski dómarin skal døma í dysti hjá einum av miðalstóru fótbóltstjóðunum.

Og eyka hugaligt man tað vera, at talan er um dyst, sum verður sendir beinleiðis. Bæði Sky Sports og ViasatSport3 senda dystin beinleiðis, og soleiðis hevur stórur partur av føroyskum hyggjarum møguleika at fylgja dystinum. Á Sky byrja tey at senda klokkan 19, og á ViasatSport kl. 19.25.

## John Eystberg skal venja Fram

Annar av hjálparvenjarunum hjá HB seinastu tvey árini er nú settur sum venjari hjá Fram.

John hevur seinnu árini vunnið sær royndir í GÍ og HB, men nú verður tað hann, sum skal standa á odda fyri venjingini hjá Fram.

Málið hjá felagnum er at flyta upp í 1. deild komandi kappingarár, og á tann hátt at stabilisera seg nakað nærri oddinum, enn støðan seinnu árini hevur borgað fyri.

# Støkk og Havnar Fimleikafelag fóru við gullinum



*Kristina Toftegaard frá Støkk á bitanum.*

**Leygardagin var ítróttarhøllin á Hálsi í Havn karmur um spennandi kappingina fyri lið um Føroyameistaraskapin í amboðsfimleiki**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@sosialurin.fo*

Fitt av fólki var og hugdi, tá ið Føroya Fimleikasamband skipaði fyri FM-amboðskapping fyri lið leygardagin. Tað skerst ikki burtur, at føroysku fimleikararnir gerast betri og betri fyri hvørja kapping, sum er á skránni. Kappingin er hørð, eisini innanhýsis í feløgunum, og hetta ger, at støðið í føroyska fimleikaheiminum er í støðugari hækking.

Vegna streymslit var kappingin nakað seinkað, men væl gekk, tá ið fimleikararnir endiliga sluppu í gongd. Kappingin var skipað í tveimum; fyrra kappingin var fyri menn og kvinnur; hin kappingin var fyri mans- og kvinnuunglingar, gentur og dreingir, piltar og pinkur.

Sum vant kappaðust fimleikararnir í trimum greinum. Genturnar kappaðust á gólvi, í lopi um hest og á bitanum. Dreingirnir kappaðust á gólvi, í lopi um hest og í ringunum.

Fimleikararnir, ið kappaðust, vóru frá trimum feløgum: Havnar Fimleikafelag, Ljósinum og Støkk. Liðkappingin er skipað soleiðis, at tríggir teir bestu karakterirnir hjá hvørjum liði verða taldir við. Á hvørjum liði kunnu í mesta lagi vera fimm fimleikarar.

Hóast kappingin var sera spennandi, gjørdist hetta ein sera langur dagur, serliga hjá yngru fimleikarunum og ikki minst dómarunum, sum sótu og dømdu heilt frá kl. 12:00 til 19:30, tá ið kappingin var liðug.

Føroyameistararnir leygardagin vóru allir úr Støkk ella Havnar Fimleikafelag. Støkk eigur føroyameistararnar hjá kvinnunum, pinkunum og dreingjunum. Havnar Fimleikafelag eigur føroyameistararnar hjá monnunum, kvinnuunglingunum, gentunum og piltunum. Einki lið var í bólkinum fyri mansunglingar, og í bólkunum hjá kvinnuunglingunum og piltunum var Havnar Fimleikafelag einasta felag, ið megnaði at stilla upp við liði.

Eingin ivi er í, at fimleikarar og venjarar hava gjørt eitt megnar arbeiði hetta seinasta árið; nýggj lop um hest vóru at síggja, umframt at støðið á hinum amboðunum eisini er hækkað. Venjingarumstøðurnar hjá amboðsfimleikarunum í Føroyum eru batnaðar nakað, men enn er langur vegur á mál. Tað sæst tó, at fimleikararnir fáa nógv burturúr venjingarlegunum uttanlands, sum fleiri teirra hava verið til í ár. Tað verður heilt víst spennandi at fylgja amboðsfimleikarunum framyvir.

## Úrslitini vóru hesi:

**Kvinnur:**
1. Støkk ... 101,8 stig
2. Ljósið ... 96,0 stig
3. Støkk ... 93,8 stig

**Menn:**
1. Havnar Fimleikafelag ... 104,3 stig
2. Støkk ... 102,5 stig

**Kvinnuunglingar:**
1. Havnar Fimleikafelag ... 60,9 stig

**Gentur:**
1. Havnar Fimleikafelag ... 64,8 stig
2. Støkk ... 62,4 stig
3. Ljósið ... 45,3 stig

**Dreingir:**
1. Støkk ... 59,7 stig
2. Havnar Fimleikafelag ... 55,6 stig

**Pinkur:**
1. Støkk ... 46,2 stig
2. Havnar Fimleikafelag ... 42,4 stig
   Ljósið ... 42,4 stig

**Piltar:**
1. Havnar Fimleikafelag ... 53,3 stig




*Spentir fimleikarar bíða eftir úrslitunum.*



*Rósing Dam frá Havnar Fimleikafelag á gólvinum.*